# Fundarfrásøgn

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir og Hans Pauli Joensen (HPJ) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, JM, HPJ, MM og Randi Frederiksberg (RF) |
| Skrivað hevur: | RF |
| Fundartíð: | Týsdagur, 18. februar 2014, kl. 9 til 12 |
| Fundarstað: | SSS |

## Mál til støðutakan:

1. **Lønarviðurskifti hjá ph.d. lesandi, sum fara í barnsburðarfarloyvi**

   JM og HPJ avgreiða málið saman við fíggjarleiðaranum.

2. **Prentaratørvur – akutt- og langtíðarloysn**

   KT-leiðarin hevur mælt til, at ein felags loysn verður gjørd fyri alt prent og kopi. Leiðslan tók undir við tilmælinum frá KT-leiðaranum. KT-leiðarin fær útbjóðingartilfar og kostnaðarmeting til vegar og kunnar leiðsluna um tað, áðrenn tað verður sent út. Til at loysa átroðkandi tørvin á NÁD, verða kopimaskinur við gjaldsstýring leigaðar.

## Mál til umrøðu:

3. **Fíggjarætlan**

   Tikið av skrá.

4. **Setursdagur 20. mai**

   Gongd er í málinum. Aulan er bíløgd og avtalur við fyrilestrarhaldarar eru um at vera upp á pláss.

5. **Strategiskjal – viðgerð og avgerð um at senda til hoyringar**

   Skjalið varð gjøgnumgingið og smáar tillagingar gjørdar. Skjalið verður sent stýrinum áðrenn komandi stýrisfund og skal eftir tað sendast starvsfólkunum á Setrinum til hoyringar.

6. **Strategi á deildunum - uppskot um, hvussu víðari kann farast fram**

   Útsett.

## Kunningarmál: